Fólk og fæ:

# Alt hevur sína søgu

## – Um eg tosi við fólk í haganum ella geri eitt kaffiprát í einum køki, so er altíð okkurt áhugavert at frætta, sigur Jónheðin Tróndheim, útvarpsmaður

*Dagny Joensen*

Tað kann vera áhugavert at lurta eftir sendingum, hóast tú ikki hevur innlit í tí, sum tosað verður um. Slík sending er náttúrusendingin hvønn sunnudag í vetrarhálvuni, sum Jónheðin Tróndheim, útvarpsmaður, skipar fyri. Tú lurtar og gloymir tíðina, tey trý korter sendingin varir.

Talan er um veruligt útvarp, har fólk og fæ eru í sínum dagliga umhvørvi. Tú hoyrir áina tutla, lombini jarma og dunnurnar gvagga. Útvarpsmaðurin gongur við sínum heimildarfólki í bøi og haga, og tú hoyrir á andadráttinum um gingið verður í brøttum ella sløttum lendi ella tá farið verður inn í okkurt fjós.

Jónheðin Tróndheim er útlærdur bilsmiður, harnæst hevur hann verið sjálvlesandi í tónleiki og ljóðtøkni á skeiðsskúla í USA. Í løtuni nemur hann sær grundútbúgving innan landbúnað og hevur verið í starvsvenjing á Royndarstøðini.

Hetta seinasta bert við tí fyri eygað, at um hann seinni kundi hugsað sær at tikið við festi, so hevur hann førleikan sum krevst.

Hann hevur havt starv í útvarpinum frá 1986, tó at hann hevur verið burtur í tíðarskeiðum, eitt nú sum tøkningur á tíðindadeildini í Danmarks Radio og seinni í Sjónvarp Føroya.

Seinastu árini hevur hann verið freelance maður og átikið sær nógvar ymiskar uppgávur.

### Trívist ikki í vanaarbeiði

Jónheðin Tróndheim: - Fyri trimum árum síðani valdi eg at fara úr starvinum í SvF, av tí at eg trívist ikki so væl í vanaarbeiði. Eg valdi hesa arbeiðsskipan, hóast ein vandi er, at eg kanska ikki havi nakað arbeiði í morgin.

Tí eru mínar ymsu útbúgvingar gjørdar rættiliga tilvitað, fyri at hava fleiri bein at standa á. Tað ger millum annað, at tú kanst hvíla í tí arbeiðsuppgávu sum tú hevur í løtuni, og ikki skal hugsa um annað, sigur Jónheðin Tróndheim.

Í sínum dagliga arbeiði fæst hann við at gera heimasíður og tekur av og á vaktir í útvarpinum, ella eisini veitir hann eina hjálpandi hond á onkrum bóndagarði, sum hevur tørv á tí.

Jónheðin Tróndheim er giftur og eigur tvey børn. Hann er argjamaður og hevur bygt á trøðni hjá ommu og abba sínum. Tríggjar stórar træir eru nærindis sethúsini, har gæs, dunnur og seyður gongur.

Tá henda samrøðan varð gjørd, ringdi telefonin hjá Jónheðini. Ein starvsfelagi í útvarpinum bað hann koma at seta klemmur í



*Jónheðin Tróndheim: – Fyri trimum árum síðani valdi eg at fara úr starvinum í SvF, av tí at eg trívist ikki so væl í vanaarbeiði. Eg valdi hesa arbeiðsskipan, hóast ein vandi er, at eg kanska ikki havi nakað arbeiði í morgin*



***Útvarpssendingarnar hjá Jónheðin Tróndheim eru viðkomandi, av tí at hann hittir fólk og fæ í teirra dagliga umhvørvi. Tú hoyrir áina tutla, lombini jarma og dunnurnar gvagga***